## Howard-avtala er í lagi



Ovasta nevndin fyri Premier League hevur kannað, hvørt handilin millum Everton og Manchester United var í lagi, tá Everton keypti málverjan, Tim Howard. Orsøkin er, at Everton ikki nýtti Tim Howard í dystinum móti Manchester United. Talan var upprunaliga um leigusáttmála, og í slíkum kundi United noktað málverjanum at spæla. Tann reglan er tó ikki galdandi, um talan er um sølu, og tað fekk fleiri at seta spurnartekin við handilin. Nú er tó staðfest, at tað stóð Everton frítt at nýta Howard, men at tað var teirra egna avgerð, at hetta ikki varð gjørt.

## Mourinho ynskir tillukku

Chelsea venjarin, Jose Mourinho, er vanliga ikki maðurin, sum nýtir ov nógvar rósur til mótstøðuna. Men hann nýtti kortini vikuskiftið til at ynskja Manchester United tillukku við meistaraheitinum. Men hann rósti tó samstundis sínum egnu spælarum. – Alt árið hava spælararnir stríðst móti øllum. Teir eru veruliga hetjur, og sjálvur eri eg meira errin í dag, enn eg var, tá vit vórðu meistarar í fjør og í fyrraárið.

# Sir Alex hóttir nú Liverpool




*Upp á 20 ár er støðan í all-time meistaradystinum 18-16 til Liverpool móti Manchester United. Tann støðan sýndi 16-7, tá Sir Alex Ferguson kom til felagið í 1987*
*Mynd: Polfoto/AP*

**Nývunna meistaraheitið er tað 16. hjá Manchester United. Av hesum hevur Sir Alex Ferguson stýrt felagnum til tey níggju**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast tað eftir hondini eru 17 ár, síðani seinasta meistaraheitið kom til høldar, so er Liverpool framvegis mest vinnandi enska felagið. Við 18 meistaraheitum hevur felagið staðið væl og virðiliga ovast í samanteljingini í skjótt nógv ár. Fyrst og fremst takkað verið framúr arbeiðinum, sum Bill Shankley framdi, og sum Bob Paisley síðani bygdi víðari á.

Frá 1963 til ’90 vann Liverpool ikki færri enn 13 meistarheiti, men síðani hetta hevur tað tó verið so sum so við gullinum. Tvey silvur- og fýra bronsumerki hevur talan verið um, og tað hevur givið øðrum liðum møguleikan at troka seg framat.

### Fergie og Giggs

Og tí møguleikanum hevur Sir Alex tikið av. Tá hann kom til Manchester United fyri 20 árum síðani, stóð 16-7 til Liverpool í dystinum um flest meistaraheiti. Men síðani hava reyðu devlarnir etið burtur av muninum. Síðani 1992 hevur Manchester United vunnið heiðursmerki á hvørjum ári, og við níggju meistaraheitum, fimm silvur- og trimum bronsumerkjum er einki løgið, at viðhaldsfólkini meira enn hálova Sir Alex.

Sjálvur hevur hann tó altíð víst á, at í hansara hugaheimi var Sir Matt Busby tann største. Einamest grundað á, at hesin við trimum ættarliðum av spælarum megnaði at føra gullið til Old Trafford. Eitt kynstur, sum Fergie nú sjálvur hevur gjørt honum eftir.

Og tó eru trý ættarlið kanska at taka dekan ov rívan til. Ein felagsnevnari hevur nevnliga verið øll árini. Ryan Giggs hevur átt sín lut í øllum níggju meistaraheitunum, sum Fergie hevur vunnið. Og í so máta var tað helst hóskandi, at gullkósin av álvara varð rættað av í útidystinum móti grannunum úr City. Tað var nevnliga á Maine Road, at tann tá 17 ára gamli Giggs debuteraði á vári 1991.

### Vístu karakter

Tá Ferguson sjálvur gjørdi viðmerkingar til gullið sunnudagin, var tað eingin einstakur spælari, sum varð drigin úr rúgvuni.

- Tað er ikki lætt at halda leiðsluna í hálvt ár, tá tú veitst, at Chelsea alla tíðina er beint í hølunum á tær.

- Tað týdningarmesta var treisknið hjá spælarunum, tá skaðar av álvara fóru at gera um seg. Og eg kann bara rósa teimum, sum viku eftir viku megnaðu at standa ímóti trýstinum.

Um sína egnu framtíð sigur Ferguson, at hann framvegis hevur hug at vera partur av fótbóltsheiminum. Eisini hóast hann á heysti 2001 ætlaði at gevast. Ein avgerð, sum hann tó síðani angraði.

- Tað er lætt at gevast. Ta ferðina var tað ein skjót avgerð, ið eg angraði mest sum alt fyri eitt. Í dag ressist eg av ungu spælarunum, sum støðugt gera um seg, og av royndum spælarum sum Giggs, Neville og Scholes, ið fara á vøllin viku eftir viku.

Tað gevur mær eina góða kenslu. Eg veit ikki, hvussu leingi hon stendur við, men eg njóti bara hvørja løtul, sigur Ferguson.

## West Ham hómar bjargingina

Íslendska ævintýrið í West Ham er kanska ikki heilt misneydnað. Leingi hevur liðið mest av øllum verið eitt tað besta boðið upp á ein niðurflytara, men seinastu vikurnar er vend komin í.

Leygardagin spældi West Ham móti Bolton, og her vunnu teir ein tryggan 3-0 sigur. Serstakliga tykist Carlos Tevez nú av álvara at blóma. Við einum perlumáli upp á fríspark og eitt meira einfalt úr stuttari fjarstøðu var hann maðurin, sum sendi London-felagið á sigurskós. Og hann átti eisini sín lut, tá dysturin var sløktur við einum framúr vøkrum heilfluktara frá Mark Noble.

Sigurin ber við sær, at West Ham nú er trý stig frá Wigan, sum er á trið niðasta plássinum í Premier League. Wigan spælir á seinasta leikdegi á útivølli móti Sheffield United. Tá skal West Ham spæla útidyst móti nýkosnu meistarunum úr Manchester United.

Eisini Charlton, sum eru næstniðastis, kunnu vinna West Ham aftur. Hetta krevur tó, at Charlton vinnur báðar sínar seinastu dystir. Hesir eru á heimavølli móti Tottenham og á útivølli móti Liverpool.

**-mørk**